Jeanett Debb til Føroya

Í mai mánaði fer danska songkvinnan Jeanett Debb at syngja á konsertum í Klaksvík og á Kambsdali

Jeanett Debb kemur til Føroya at halda konsertir í mai

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Fríggjakvøldið 10. og leygarkvøldið 11. mai ber til at hoyra donsku songkvinnuna Jeanett Debb syngja á føroyskum palli.

Fríggjakvøldið verður hon við á konsert í KÍ-høllini í Klaksvík, og leygarkvøldið fer hon á pallin í ítróttarhøllini á Kambsdali.

Tað er Lognbrá, sum hevur fingið Jeanett Debb til Føroya.

Jeanett gjørdist rættiliga kend í Danmark, tá hon sang í fyrstu Big Brother sendirøðini. Í fjør gav hon út eina fløgu og fyrr í ár tók hon lut í danska Melodi Grand Prixnum við sanginum Medieshow.

Tá Pætur við Keldu var við í sendingini Hit med sangen í Danmarks Radio, var júst Jeanett Debb liðfelagi hjá honum.

Umframt donsku songkvinnuna fer eisini lovandi klaksvíksbólkurin Chain at spæla á báðum konsertunum, og plátuvendari fer eisini at spæla nýggjan tónleik.

Stór byggistevna í Runavík

TÍÐINDASKRIV



3. mai, verða hurðarnir latnar upp, fyri størstu bústevnu nakrantíð í Føroyum. Stevnan sum verður í Runavík, hýsir øllum teimum førandi fyritøkunum sum hava við føroyska byggimarknaðin ella innbúgv at gera. Áhugin at verða við er so mikið stórur, at umframt ítróttarhøllina, er eisini eitt risa stórt telt leiga heim til endamálið.

Stevnan er til allar føroyingar - bæði teimun sum ganga við tankum at byggja nýggj hús, teimun sum hava ætlanir at umvæla tey gomlu og teimun sum hava í huga at keypa sær innbúgv av ymiskum slag. Av tí at tað er ókeypis at koma inn, væntað fyrireikarnir nógv vitjandi.

Stevnan verður 3., 4. og 5. mai og hava børn bert atgongd saman við vaksnum.

Eyðun og Pætur fyri fyrstu ferð

Eyðun Nolsøe, sum hevur arbeitt nógv saman við Terja Rasmussen seinastu árini, er nú farin í tónleikaligt samstarv við bygdamannin Pætur við Keldu. Fríggjadagin spæla teir fyri fyrstu í Føroyum



Eyðun Nolsøe, h.m., og Pætur við Keldu hava ymiska bakgrund tónleikaliga og menniskjaliga, men nú hava teir funnið saman til tónleikaligt samstarv

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Eyðun og Terji hava verið eitt av heitu nøvnunum til dansir og konsertir í Føroyum seinastu árini, men nú er hetta samstarvið farið eitt sindur í bakgrundina, eftir at Terji Rasmussen er fluttur úr Danmark til Nólsoyar at búgva.

Terji er farin at spæla saman við nólsoyingum, og Eyðun Nolsøe er nú farin at arbeiða saman við einum øðrum klaksvíkingi á høvuðsstaðarleiðini, Pæturi við Keldu.

– Teir eru sera ymiskir sum persónar, men báðir góðir tónleikarar. Terji dugir sera væl at hava samband við áhoyrarar og at halda lív í, meðan Pætur er hugtakandi, tí hann er so inniligur. Mær dámar sera væl at spæla saman við teimum báðum, og eg kann ikki taka annan fram um hin. Men tað ber í hvussu so er til at staðfesta, at teir eru ymiskir, sigur Eyðun Nolsøe.

Kendust ikki

Samstarvið við Pætur við Keldu er komið líðandi, eftir at Pætur flutti til Keypmannahavn fyri tveimum árum síðani. Pætur var til onkrar framførslur hjá Eyðuni og Terja, og teir komu at práta saman.

Síðani fóru teir at tosa um at spæla saman, og fyrstu ferð føroyingar kunnu uppliva nýggja samstarvið, verður á konsertini við Brandur Enni í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið. Tá fara Eyðun og Pætur at hita upp fyri unga stjørnuskotið, sum kemur við nýggjari fløgu um vikuskiftið.

– Eg kendi ikki Pætur, áðrenn eg hitti hann í Keypmannahavn. Vit hava ymiska bakgrund, men tað er eingin trupulleiki, tá tað snýr seg um tónleik. Tónleikur sameinar, hann skilir ikki fólk, og soleiðis er eisini við okkum báðum, sigur Eyðun Nolsøe.

Mótmæla grindadrápi í Berlin

- Tað hevur verið sera friðarligt um grindadráp í longri tíð, men nú um dagarnar mótmæltu nakrir "aktivistar", sum Ólavur Sjúrðarberg kallar hesi, móti grindadrápi í samband við eina ferðavinn ustevnu í Berlin. Grindamannafelagið heldur annars aðalfund í Havn leygardagin

GRIND
Vilmund Jacobsen

- Lítil og eingin ágangur hevur annars verið móti okkara grindadrápi seinastu árini, sigur Ólavur Sjúrðarberg, formaður í Grindamannafelagnum, sum heldur aðalfund leygardagin.

Í samband við eina ferðavinnustevnu í Berlin um dagarnar, boðaðu fólk, sum eru ímóti hvalaveiði og grindadrápi frá, at tey fóru at nýta høvi at mótmæli japanskari og norskari hvalaveiði, og føroyskum grindadrápi.

Ólavur Sjúrðarberg hevur ikki frætt, hvussu leikur fór í Berlin, men ivast ikki í, at "aktivistarnir" gjørdu seg galdandi við sínum mótmæli.

Hann vísir annars á, at tað hevur verið stak friðarligt við mótmælum móti grindadrápi í seinastuni, og hetta er fyrstu ferð í langa tíð, at felagið hevur frætt um slík mótmæli.

- Eg vil siga, at lítil og eingin ágangur hevur verið seinastu árini, sigur Ólavur.

Aðalfundur

Grindamannafelagið heldur annars aðalfund í Norðurlandahúsinum leygardagin, 6. apríl kl. 13.30.

Umframt vanligu skránna, sum er á einum slíkum aðalfundi, fer Arni Thorsteinsson at greiða frá ymiskum fornfrøðisligum í samband við grind og grindadráp.

- Her fer fornfrøðingurin m.a. at greiða frá, at sóknarongulin ikki er gamalt amboð í Føroyum, sum mangur ivaleyst hevur hildið.

Tríggir nevndarlimir eru í Grindamannafelagnum, og hesaferð stendur formaðurin fyri vali.

Ólavur hevur verið formaður í felagnum í trý ár, og undan honum var Hans Jakku Hermansen formaður.

Hetta verður níggjundi aðalfundur felagsins, og tað merkir, at felagið komandi ár fyllir 10 ár.

Almennur

Á aðalfundinum, har grindaformenn og sýsluformenn eru bodnir við, fer Kate Sanderson eisini at greiða frá um felagsskapin, IWC.

Annars er tað serstakt fyri aðalfundin hjá Grindamannafelagnum, at hesin er almennur.

- Øll eru vælkomin á fundin, sigur Ólavur Sjúrðarberg.

Vanliga plaga eini 70-100 fólk at verða á aðal fundi hjá Grindamannafelagnum.

HEILSANIR



Góði gubbi
Hjartaliga tillukku á 30 ára føðingardegnum, sum var 29. mars. Alt tað besta.
Heilsan Súsanna



Góða, fitta Heidi
Hjartaliga tillukku á 5 ára degnum.
Heilsan Hannis

Góða, elskaða stórasystir
Hjartaliga tillukku við 23 ára føðingardegnum tann 4. apríl.
Allar bestu heilsanir, Hans David og Sólja



Góða, elskaða Malla
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 5. apríl. Jesus signi teg.
Heilsan omma, abbi og mammubeiggi

Góða, elskaða Martha
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum við Guds signing.
Heilsan Sonja omma og Óli abbi



Góða Edna
Hjartaliga tillukku á 2 ára degnum 5. apríl ynskja
omma og abbi í Sørvági

Góða Beinta
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum tann 4. apríl. Takk fyri alt vit hava havt saman gjøgnum árini. Eisini ein heilsan til Bjartu, sum fyllir 19.
Heilsan vinkona tín

Góða Maria
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum 4. apríl. Allar bestu ynski frá
mammu, babba og Hera

Elskaða dóttir og systir
Lukku og gleði á tínum 4 ára degi. Vit elska teg nógv, góða barnið.
Heilsan mamma, babba og Petur

Góða, fitta Martha
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 5. apríl. Jesus pápi signi framtíð tína.
Heilsan omma og abbi við Marknagilsveg

Góði babba
Hjartaliga tillukku við degnum sum var í gjár.
Bestu heilsur Beinta, Teitur og Heri



Góða, elskaða Malla
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Jesus veri hjá tær.
Heilsan mamma

Góða Martha
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum. Jesus signi teg.
Heilsan Bogi gubbi og Sólja



Góða, elskaða Judit
Mamma, babba og eg ynskja tær hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum. Muss og klemm frá
Hans Sejer

Her er hon lítil og fitt - nú er hon bara fitt. Tillukku við teim 25. Have a nice day!!! (Hvat er hatta)
Heilsan Per (ella Pól?) Nei ha?

Góða Heidi
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 5 ára føðingardegnum í dag. Hannis fær eisini eina heilsan.
Omma, abbi og Finn Ingi

Heilsanir 30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:...

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ....
Bústaður: ....
Bygd/býur: .... Tlf.: ....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«